# Mentamálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 7. januar 2019 |
| Mál nr.: | 18/00383 |
| Málsviðgjørt: | AW |

**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um savnsvirksemi landsins**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**savnsvirksemi landsins**
**(savnslógin)**

## Kapittul 1
## Almennar ásetingar

*Endamál*

**§ 1.** Endamálið við lógini er at fremja savnsvirksemi landsins og við tí at tryggja mentanararv og náttúruarv Føroya fyri framtíðar ættarlið, geva atgongd til og fremja vitan um henda arv og tilvit um tilknýtið við heimin kring okkum.

*Virkisøki*

**§ 2.** Lógin fevnir um savnsvirksemi hjá landinum innan mentanarsøgu, náttúrusøgu og list.

*Stk. 2.* Lógin fevnir ikki um bókasavnsvirksemi ella skjalasavnsvirksemi.

*Skilmarking*

**§ 3.** Søvn sambært hesi lóg eru almannagagnligir stovnar, ið ikki hava vinning fyri eyga, men sum virka fyri samfelagi og framburði, til kanningar og lærandi endamáls og til gamans. Tey eru atkomulig hjá øllum, opin fyri almenninginum og savna, skráseta, varðveita, granska, sýna fram og miðla tað, ið ber vitni um fólk og teirra umhvørvi. Søvnini eru trygg støð, har luttøka og fjølbroytt fatan av mentan, list, náttúru og vísind nørist og mennist.

*Stk. 2.* Við innsavning, skráseting, varðveiting, gransking, framsýningum og aðrari miðlan, ið eru sínámillum samanknýtt virksemi, er tað uppgávan hjá søvnunum úr heimligum og alheimsligum sjónarhorni

1) at tryggja mentanararvin og náttúruarvin fyri framtíðina,
2) at gera vitan um mentanararv og náttúruarv Føroya tíðarbæra, atkomuliga og viðkomandi,
3) at styrkja savningar og skjalfestingar og gera tær atkomuligar hjá almenningi og granskarum,

4) at lýsa mentanarsøgu, náttúrusøgu og listasøgu landsins og
5) at menna nýtslu og týdning av mentanararvi og náttúruarvi fyri borgaran og samfelagið.

## Kapittul 2

## Høvuðssøvn

**§ 4.** Landið rekur høvuðssøvn innan mentanarsøgu, sbrt. kapittul 3, náttúrusøgu sbrt. kapittul 4 og list sbrt. kapittul 5. Høvuðssøvnini eru miðstøðir fyri savnsvirksemi á hvør sínum øki.

*Stk. 2.* Høvuðssøvnini ganga undan í savnspurningum, veita savnsfakliga ráðgeving og slóða fyri fakligum samstarvi við aðrar partar á hvør sínum øki.

*Stk. 3.* Høvuðssøvnini samstarva við skúlaverkið, myndugleikar, søvn, stovnar og feløg um savnstænastur, ið laga seg til ávísar málbólkar.

*Stk. 4.* Høvuðssøvnini fremja samstarv millum søvn og stuðla framburði og samskipan av almenna savnsvirksemi landsins.

*Stk. 5.* Høvuðssøvnini halda miðsavnaðar skráir innan síni virkisøki, ið eru tøkar hjá almenninginum, granskarum og viðkomandi myndugleikum.

*Stk. 6.* Høvuðssøvnini kunnu útvega sær aðra fígging við inntøkufíggjaðum virksemi, gjøgnum stuðulsveiting úr grunnum og líknandi og við sølu av tænastum og líknandi.

## Kapittul 3

## Mentanarsøguligt høvuðssavn

**§ 5.** Landið rekur mentanarsøguligt høvuðssavn.

*Stk. 2***.** Uppgávan hjá mentanarsøguliga høvuðssavninum er at lýsa mentan í Føroyum og bundinskap hennara at mentanum heimsins. Mentanarsøguliga savnið lýsir broyting, fjølbroytni og gongdina í lívskorum hjá fólki frá elstu tíðum til dagin í dag.

*Stk. 3.* Mentanarsøguliga høvuðssavnið skal stovna og halda umboðandi savningar og skjalfestingar fyri mentanarsøgu í Føroyum.

*Stk. 4.* Savningarnar og skjalfestingarnar hjá mentanarsøguliga høvuðssavninum eru støði undir gransking og framsýningum og aðrari miðlan hjá savninum.

*Stk. 5.* Mentanarsøguliga høvuðssavnið skal sjónliggera og perspektivera savningarnar gjøgnum millumtjóða samstarv.

*Stk. 6.* Mentanarsøguliga høvuðssavnið varðar av fornfrøðiligum kanningum, tilfari og skrásetingum á sjógvi og á landi.

*Stk. 7.* Mentanarsøguliga høvuðssavnið umsitur friðað fornminni og friðaðar bygningar og er umsiting hjá fornminnamyndugleikanum.

*Stk. 8.* Mentanarsøguliga høvuðssavnið kann eisini varða av virksemi, ið er álagt savninum í aðrari lóggávu ella av øðrum virksemi, ið landsstýrismaðurin áleggur høvuðssavninum.

*Stk. 9.* Tjóðsavnið er mentanarsøguliga høvuðssavn landsins.

## Kapittul 4

## Náttúrusøguligt høvuðssavn

**§ 6.** Landið rekur náttúrusøguligt høvuðssavn.

*Stk. 2.* Uppgávan hjá náttúrusøguliga høvuðssavninum er at lýsa náttúruna frá upphavi til okkara tíð. Náttúrusøguliga høvuðssavnið lýsir náttúruna,

náttúrusøguligu gongdina, nútíðar umhvørvi, og samspælið millum náttúru og fólk.

*Stk. 3.* Náttúrusøguliga høvuðssavnið skal stovna og halda umboðandi savningar og skjalfestingar fyri føroyska náttúru innan djórafrøði, plantufrøði og jarðfrøði.

*Stk. 4.* Náttúrusøguliga høvuðssavnið skal sjónliggera og perspektivera savningarnar gjøgnum millumtjóða samstarv.

*Stk. 5.* Savningarnar og skjalfestingarnar hjá náttúrusøguliga høvuðssavninum eru støði undir gransking og almenna upplýsingarvirkseminum hjá søvnunum.

*Stk. 6.* Náttúrusøguliga høvuðssavnið varðar av náttúruvísindaligum tilfari og náttúrufrøðiligum kanningum og skrásetingum innan síni øki á sjógvi og á landi.

*Stk. 7.* Náttúrusøguliga høvuðssavnið kann eisini varða av virksemi, ið er álagt savninum í aðrari lóggávu ella av øðrum virksemi, ið landsstýrismaðurin áleggur høvuðssavninum.

*Stk. 8.* Tjóðsavnið er náttúrusøguliga høvuðssavn landsins. Á jarðfrøðiliga økinum er Jarðfeingi høvuðssavn.

## Kapittul 5

## Høvuðslistasavn

**§ 7.** Landið rekur høvuðslistasavn.

*Stk. 2.* Uppgávan hjá høvuðslistasavninum er at lýsa føroyska myndlist og myndlist, sum er viðkomandi fyri landið, í fortíð og nútíð. Høvuðslistasavnið lýsir myndlistasøgu, nútíðar yvirbragd í listini og fagurfrøðiliga og fatanarliga vav hennara.

*Stk. 3.* Høvuðslistasavnið skal stovna og halda umboðandi savningar og skjalfestingar fyri føroyska myndlist.

*Stk. 4.* Høvuðslistasavnið skal sjónliggera og perspektivera savningarnar gjøgnum millumtjóða samstarv.

*Stk. 5.* Savningarnar og skjalfestingarnar hjá høvuðslistasavninum eru støði undir gransking og almenna upplýsingarvirkseminum hjá listasavninum.

*Stk. 6.* Høvuðslistasavnið kann eisini varða av virksemi, ið er álagt savninum í aðrari lóggávu ella av øðrum virksemi, ið landsstýrismaðurin áleggur høvuðssavninum.

*Stk. 7.* Sjálvsognarstovnurin Listasavn Føroya er høvuðslistasavn landsins.

## Kapittul 6

## Menning av savnsvirksemi landsins

*Skipan*

**§8.** Landsstýrismaðurin varðar av og skipar fyri menning av samlaða savnsvirksemi landsins, sbrt. § 9 og § 10.

*Savnsráð*

**§ 9.** Landsstýrismaðurin tilnevnir eitt savnsráð, ið skal ráðgeva landsstýrismanninum í savnsmálum og skipa fyri átøkum og tiltøkum at menna savnsøkið.

*Stk. 2.* Savnsráðið virkar fyri, at savnsvirksemi landsins er í tráð við altjóða leiðreglur og tilmæli.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um savnsráðið, harundir uppgávur hjá ráðnum, tal av limum og hvussu ráðið er samansett. Høvuðssøvnini eru altíð umboðað í savnsráðnum.

*Stuðul*

**§ 10.** Landsstýrismaðurin veitir stuðul til savnsvirksemi, ið er góðkent sum liður í

samlaða savnsvirksemi landsins. Stuðulin verður veittur sambært serstakari lóggávu og nærri reglum, ið landsstýrismaðurin ásetur.

**Kapittul 7**

**Serligar ásetingar**

*Serligar ásetingar*

**§ 11.** Søvn mugu ikki útvega sær eitt verk ella ein grip, um verkið ella gripurin eru útflutt úr øðrum landi í stríð við lóggávuna í landinum, og um viðurskiftini eru umfatað av einum altjóða sáttmála, sum viðkomandi land og Føroyar hava tikið undir við.

*Stk. 2.* Er ein útvegan farin fram í stríð við stk. 1, skal verkið ella gripurin berast aftur í samsvari við altjóða sáttmálan, sum er nevndur í stk. 1.

**§ 12.** Søvn sambært hesi lóg kunnu bert skilja út verk ella gripir úr savningunum við loyvi frá landsstýrismanninum.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann góðkenna, at landið í serligum føri átekur sær tryggingarváða fyri at verk ella gripir kunnu verða sýnd fram í Føroyum.

*Fyrisiting*

**§ 13.** Landsstýrismaðurin kann heimila einum høvuðssavni ella savnsráðnum at útinna tær heimildir, sum í hesi løgtingslóg liggja hjá landsstýrismanninum. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um uppgávurnar.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um atgongd til at kæra avgerðir, sum eru tiknar sambært heimildum eftir stk. 1, harundir at avgerðir ikki skulu kunna leggjast fyri landsstýrismannin.

*Gildiskoma*

**§ 14.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*Stk. 2.* Samstundis fara úr gildi løgtingslóg nr. 32 frá 2. mai 1952 um fornminnissavn og løgtingslóg nr. 26 frá 17. august 1955 um Føroya Náttúrugripasavn.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### Orsakir til uppskotið

Lóggávan á savnsøkinum hevur nógv ár á baki og samsvarar ikki við hvussu søvnini nú eru skipað, og innihaldsliga er tørvur eisini á dagføring. Við lógaruppskotinum er ætlanin at skapa felags lógarkarmar fyri savnsvirksemið hjá landinum.

Landið rekur søvn innan mentanarsøgu, náttúrusøgu og list. Við lógaruppskotinum fáa tey dagførdar lógarkarmar at virka undir, og eitt savnsráð verður sett at virka fyri menning á savnsøkinum.

Søvnini standa framman fyri fleiri møguleikum og avbjóðingum. Samfelagsmenning, altjóðagerð, tilflyting og vaksandi ferðafólkavinna seta alt størri krøv til søvnini, bæði í mun til innsavning, varðveiting og gransking og í sambandi við framsýningar og miðlan.

Sambært kanningini *Museer i Norden*, sum Kulturanalys Norden gjørdi fyri Norðurlendska Ráðharraráðið í 2018, liggur talið á vitjanum á føroysku søvnunum væl niðan fyri talið á vitjanum á søvnum í londunum kring okkum. Fyri hvønn íbúgva í Føroyum vóru 0,4 vitjanir á føroysku søvnunum í 2016, og harav vóru meir enn helmingurin útlendingar. Hetta er væl minni enn í Íslandi, har 7,9 vitjanir vóru fyri hvønn íbúgva (í 2015), í Álandi, har 4,7 vitjanir vóru á álendsku søvnunum fyri hvønn íbúgva í 2016 og í Danmark, har 2,6 vitjanir vóru fyri hvønn íbúgva. Tølini eru gjørd upp fyri tey søvn, sum eru í tráð við allýsingina hjá ICOM, og har í minsta lagi 1 savnsfakligt fólk er í fullum starvi. Kanningin greinar ikki nærri, hví so lutfalsliga fá fólk vitja føroysku søvnini, men tað er greitt, at savnsøkið stendur fyri stórum menningarmøguleikum, og ein dagførd lóggáva er liður í hesum.

Lógaruppskotið skal tryggja, at søvnini eru viðkomandi, opin og at øll hava atgongd til tær skjalfestingar, teir gripir og tey verk, sum umboða vitan og eru dømi um okkara felags mentanararv, náttúruarv og list. Tað er uppgávan hjá søvnunum at veita tænastur, ið stuðla undir upplýsing, vitan, trivnað og fólkaræði, og við lógaruppskotinum verða felags lógarkarmar settir fyri hesum virksemi.

Lógaruppskotið skal eisini tryggja, at savnsvirksemið er í tráð við altjóða leiðreglur og tilmæli á savnsøkinum, og at savnsøkið fær karmar at virka innanfyri, ið tryggja dygd, menning og samstarv.

### Galdandi lóggáva

Søvnini, ið landið rekur, eru Tjóðsavnið, Jarðfeingi og Listasavn Føroya. Almennu søvnini hjá landinum vórðu sett á stovn í árunum 1946-1955.

Galdandi løgtingslógir skipa virksemið á tveimum stovnum, nevniliga Føroya Fornminnissavni og Føroya Náttúrugripasavni:

- Løgtingslóg nr. 32 frá 2. mai 1952 um fornminnissavn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 9. apríl 1964.
- Løgtingslóg nr. 26. Frá 17. august 1955 um Føroya Náttúrugripasavn, seinast broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 10. mai 2000.

Føroya Fornminnissavn varð skipað við løgtingslóg í 1952 við støði í tí forngripasavni, ið Føroya Forngripafelag í 1946 lat Føroya Løgtingi. Lógin ásetur virkievni hjá stovninum, sum eru

- at skráseta, kanna og hava eftirlit við jarðføstum fornminnum, sum lýst er í løgtingslóg um friðan av føstum fornminnum og bygningum
- at fyrireika og standa fyri útgrevstri av toftum, fornum búplássum og søguligum lendum,
- at savna, skráseta og framsýna fornlutir og lutir frá nýggjari tíð, sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan Føroyinga til ymsar tíðir ella eru knýttar til søguligar hendingar,
- at hava í hondum savnan av staðarnøvnum og munnliga goymdum søguminnum og hava hetta tilfar greitt til vitskapliga granskan.

Sambært lógini verður ein antikvarur settur at standa fyri virkseminum á stovninum. Lógin hevur verið óbroytt síðan 1952, tó við eini broyting í 1964, tá ásetingin um at lønin hjá antikvarinum verður fyrisett á fíggjarlógini, varð strikað. Sjálvt um uppgávan sambært lógini er løgd til Fornminnissavnið, so er *savnan av staðarnøvnum og munnliga goymdum søguminnum* fyri rúmari tíð síðan flutt til Fróðskaparsetrið.

Føroya Jarðfrøðisavn varð skipað í sambandi við jarðfrøðiliga kortlegging í 1951. Við løgtingslóg um Føroya Náttúrugripasavn gjørdist Jarðfrøðisavnið í 1955 ein av trimum deildum á Náttúrugripasavninum. Hinar deildirnar vóru Djórasavnið og Plantusavnið. Lógin ásetur virkievni hjá stovninum, sum eru

- at savna, varðveita og framsýna náttúrugripir, sum lýsa náttúru landsins
- at savna, varðveita og handfara náttúruvísindaligt tilfar.

Ásett er, at fyristøðufólkið á Náttúrugripasavninum er ein av deildarleiðarunum á stovninum.

Við broytingini í 2000 í løgtingslóg um Føroya Náttúrugripasavn vórðu ásetingarnar um Jarðfrøðisavnið strikaðar úr lógini. Hetta varð gjørt í sambandi við, at Jarðfrøðisavnið varð flutt úr Náttúrugripasavninum í Oljumálastýrið. Eftir hetta fevndi Føroya Náttúrugripasavn bert um deildirnar Plantusavnið og Djórasavnið. Oljumálastýrið er síðan umskipað, og Jarðfrøðisavnið er í dag partur av Jarðfeingi. Jarðfeingi, sum er stovnur undir Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, virkar eftir reglugerð fyri stovnin, sum landsstýrismaðurin góðkennir. Sambært reglugerðini eru høvuðsuppgávurnar hjá stovninum:

- Kolvetnismál, og sum partur av hesum at fyrisita lóggávu innan leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum.
- Orkumál, og sum partur av hesum at fyrisita lóggávu innan framleiðslu, flutning og veiting av orku.
- Jarðfrøðiligar og landafrøðiligar uppgávur innan gransking, ráðgeving, savnsvirksemi og undirvísing.

Orkumál vórðu um ársskiftið 2015 - 2016 flutt til Umhvørvisstovuna, men reglugerðin er ikki dagførd síðan.

Føroya Fornminnissavn og Føroya Náttúrugripasavn vórðu í 2011 skipað undir Søvnum Landsins saman við Føroya landsbókasavni, Føroya Landsskjalasavni og Havlívfrøðiligu royndarstøðini, Biofar. Í tí sambandi gjørdist Havlívfrøðiliga royndarstøðin, Biofar, sum upprunaliga var ein verkætlan, partur av Náttúrugripasavninum. Lógargrundarlagið fyri søvnini í Søvnum Landsins var tó óbroytt, og í 2017 varð avgerð tikin um at skilja Søvn Landsins sundur aftur, tó við teirri broyting, at Føroya Fornminninssavn og Føroya Náttúrugripasavn vórðu løgd saman í nýggja stovnin Tjóðsavnið.

Tjóðsavnið røkir eisini eina røð av fyrisitingarligum uppgávum og myndugleikauppgávum, sum ásett í hesum lógum:

- Løgtingslóg nr. 19 frá 16. september 1948 um friðan av fornminnum og bygningum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 11 frá 19. apríl 1972.

Lógin ásetur, at stjórin fyri Føroya Forngripasavni, ein løgfrøðingur og ein bygningskønur maður manna fornminnisnevndina, sum landsstýrið setur. Fornminnisnevndin ger tilmæli um friðing sambært lógini. Við lógarbroytingini í 1972 varð ásett, at lutir eldri enn 100 ár við listarligum, mentunnarligum ella søguligum virði ikki mugu flytast av landinum uttan við loyvi frá landsantikvarinum, og at antikvarurin við landsstýrisins góðkenning kann nokta útflutning av sera merkisverdum lutum, ið eru yngri enn 100 ár.

– Løgtingslóg nr. 92 frá 21. desember 2004 um vernd av fornlutum í havinum.

Lógin ásetur, at Føroya Fornminnissavn er fakligi myndugleikin á økinum og skipar fyri fornfrøðiligum kanningum og øðrum kanningum. Tað er eisini Føroya Fornminnissavn, ið gevur loyvi, kann gera frávik og skal hava fráboðan um fornlutir í havinum.

- Løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995.

Sambært náttúrufriðingarlógini eru friðingarmyndugleikarnir tær lokalu friðingarnevndirnar, sum eru í hvørjari sýslu og yvirfriðingarnevndin, sum er fyri alt landið. Í yvirfriðingarnevndini sita sorinskrivarin, landsfornfrøðingurin, leiðarin av natúrsavninum og tveir aðrir limir, sum landsstýrið velur fyri 6 ár í senn. Nú Føroya Fornminnissavn og Føroya Náttúrugripasavn eru løgd saman, er Tjóðsavnið umboðað við tveimum limum í yvirfriðingarnevndini.

– Anordning nr. 888 fra 8. december 1999 om ikrafttræden for Færøerne af lov om folkekirkens kirkebygninger.

Sambært fyriskipanini veita landsarkitekturin og Føroya Fornminnissavn landsstýrismannninum í kirkjumálum sakkønar tænastur í kirkjuligum viðurskiftum.

– løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi, sum broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 17. juli 1986.

Sambært bygdasavnslógini hevur landsantikvarurin eftirlit við bygdasøvnum og veitir teimum hjálp og leiðbeining.

Almenna Listasavn Føroya varð skipað í 1946. Í 1989 varð Almenna Listasavn Føroya, Listafelag Føroya og Sjálvsognarstovnurin Listaskálin løgd saman og skipað í sjálvsognarstovnin Listasavn Føroya. Hetta varð gjørt í sambandi við útbyggingina av Listaskálanum í Gundadali. Listasavn Føroya verður rikið við rakstrarjáttan á løgtingsfíggjarlógini og virkar eftir viðtøkum fyri stovnin, sum landsstýrismaðurin góðkennir. Sambært viðtøkunum, sum seinast eru broyttar í 2016, er endamál og ábyrgdarøki hjá stovninum hetta:

- Listasavn Føroya røkir myndlistaliga mentanararv Føroya við innsavning, varðveitslu, skráseting, gransking og miðlan. Sum liður í hesum lýsir Listasavn Føroya

myndlistasøguna og viðkomandi rák við denti á fagurfrøðilig og sannkennandi eyðkenni.
- Listasavn Føroya ger savnsins listaverk atkomulig fyri almenningin og letur tey vera tøk til granskingin umframt at kunna um úrslit, sum savnið sjálvt kemur til í sínari gransking, og sum onnur koma til við støði í savnsins listaverkum.
- Listasavn Føroya savnar og keypir føroyska myndlist. Sum tjóðlistasavn Føroya miðar savnið ímóti at eiga tað besta savnið av føroyskari myndlist við atliti at dygd og umboðan. Listasavn Føroya kann savna inn aðra list, tá listafólk og listaverk fakliga kunnu setast í samband við Føroyar. Savnið kann taka ímóti listagávum, eisini um listin ikki hevur samband við Føroyar.
- Listasavn Føroya má ikki útvega sær verk, ið er útflutt úr øðrum landi í stríð við lóggávuna í landinum, og um viðurskiftini eru fevnd av altjóða sáttmála, sum viðkomandi land og Føroyar hava tikið undir við.
- Er útveganin farin fram í stríð við ásetingarnar í stk. 4, skal verkið berast aftur í samsvari við viðkomandi sáttmála.
- Listasavn Føroya hevur skyldu at skráseta og varðveita síni listaverk.
- Listasavn Føroya granskar fyrst og fremst í føroyskari myndlist og í aðrari list, har listafólk og listaverk fakliga kunnu setast í samband við Føroyar.
- Listasavn Føroya miðlar og sýnir fram føroyska list, og skipar fyri framsýningum av føroyskar og útlendskari list í Føroyum og uttanlands. Harumframt kann savnið eisini miðla aðra list, serliga um hon er viðkomandi fyri føroyska list.
- Listasavn Føroya kann leiga listaverk út til almennar stovnar o.l. við treytum, sum savnið ásetir.
- Listasavn Føroya eigur so vítt gjørligt at fáa til vega eitt yvirlit yvir føroyska lista á øðrum hondum.
- Listasavn Føroya fylgir etisku reglunum fyri savnsvirksemi, sum eru ásettar av ICOM (International Council of Museums).

Søvnini, ið landið rekur, virka sostatt antin eftir løgtingslógum ella eftir reglugerðum og viðtøkum, ið landsstýrismaðurin ásetur. Viðtøkurnar hjá Listasavni Føroya eru dagførdar í 2016, meðan viðtøkurnar hjá Jarðfeingi eru frá 2006 og tær svara ikki til verandi bygnað á stovninum. Løgtingslógirnar fyri Føroya Fornminnissavn og Føroya Náttúrugripasavn samsvara ikki við stovnsbygnaðin, nú Fornminnissavnið og Náttúrugripasavnið eru løgd saman í Tjóðsavnið, og innihaldsliga er eisini tørvur á dagføring.

<u>Bakstøðið fyri lógaruppskotinum</u>
Galdandi lógir hava virkað stórt sæð óbroyttar í meir enn 60 ár. Bygnaðarligar broytingar hava havt við sær tørv á broytingum í lóggávuni, men samfelagsmenningin hevur eisini havt við sær broytingar. Heimurin sá øðrvísi út fyri 60 árum síðan, og hóast søvnini framvegis røkja somu grundleggjandi uppgávur, so verður størri dentur í dag lagdur á tilknýti millum savn og samfelag, og á mentanarliga, sosiala og búskaparliga leiklutin hjá søvnunum. Hetta eigur at síggjast aftur í eini dagførdari lóggávuni.

Tá Søvn Landsins vórðu sett á stovn í 2011, vórðu stig tikin til at dagføra lóggávuna. Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri søvnini hjá landinum, bygdasøvnini, onnur søvn og Kommunufelagið gjørdu viðmerkingar til útkast til uppskot um løgtingslóg um musealt savnsvirksemi. Uppskotið var til hoyringar og á landsstýrisfundi á vári 2015, men varð tó ikki lagt fram í Løgtinginum fyri ólavsøku tað árið. Og so varð val útskrivað.

Í 2017 varð avgerð tikin um at taka Søvn Landsins av, og í staðin at skipa Føroya Fornminnissavn og Føroya Náttúrugripasavn í Tjóðsavnið. Avgerð varð eisini tikin um at leggja eitt nýtt uppskot um eina savnslóg fyri Løgtingið. Lógaruppskotið er nú broytt, so tað

samsvarar við nýggja bygnaðin á savnsøkinum, og avgerð er tikin um at taka ásetingarnar um stuðul til bygdasøvnini úr lógaruppskotinum. Seinni er ætlanin at broyta bygdasavnslógina, so lóggávan eisini fevnir um onnur søvn, eitt nú listasøvn og náttúrugripasøvn og at dagføra stuðulsskipanina á økinum.

Ein nýggj stovnslóg kundi verið gjørd einans fyri Tjóðsavnið, men hildið verður, at tað tænir endamálinum betri, at lógaruppskotið fevnir um alt savnsvirksemið hjá landinum.

Sjálvt um Jarðfeingi og Listasavn Føroya eru skipað eftir reglugerð og viðtøkum, so verður mett, at ein felags savnslóg er við til at styrkja støðuna hjá hvørjum savni sær og tryggja dygd, menning og samstarv á øllum savnsøkinum. Søvnini, sum landið rekur, og søvnini, sum landið veitir stuðul til, eru felags um uppgávuna at varðveita okkara felags mentanararv og náttúruarv til komandi ættarlið, og tí verður uppgávan best røkt við einum felags lógargrundarlagi.

Tað er ymiskt, hvussu lógargrundarlagið á savnsøkinum er skipað í londunum kring okkum. Lógaruppskotið er fyrireikað við íblástri úr danskari og íslendskari lóggávu.

Í Danmark skipar ein savnslóg virksemið á savnsøkinum, bæði hjá teimum søvnum, ið landið rekur og teimum søvnum, ið fáa stuðul frá landinum til teirra virksemi. Eitt savnsráð skipar fyri menning og samstarvi á savnsøkinum. Danska savnslógin hevur eisini ásetingar um fornfrøðiligar kanningar og fornminnafriðing.

Í Íslandi skipar ein savnslóg virksemið hjá høvuðssøvnum, viðurkendum søvnum og ábyrgdarsøvnum eins og ásetingar eru um eitt savnsráð og ein savnsgrunn, ið veitir stuðul. Afturat savnslógini eru stovnslógir fyri tvey av høvuðssøvnunum, Þjóðminjasafni Íslands og Náttúruminjasafni Íslands, meðan ein myndlistalóg hevur nærri ásetingar um virksemið hjá Listasafni Íslands.

Noreg og Svøríki hava lóggávur, ið verja náttúru og mentanarminni, men hava ikki savnslógir.

<u>Altjóða leiðreglur, tilmæli og sáttmálar</u>
Bæði Tjóðsavnið, Jarðfeingi og Listasavn Føroya eru limir í altjóða savnsfelagsskapurin ICOM, the International Council of Museums, sum varð settur á stovn í 1946. Yvir 40.000 søvn og savnsfólk í 141 londum eru limir í felagsskapinum. Endamálið hjá ICOM er at virka fyri varðveiting av mentanararvinum við at fremja samstarv og yrkisligt savnsvirksemi í øllum heiminum. ICOM virkar á hugsjónarligum grundarlagi (Non-Governmental Organization) undir UNESCO, ST-stovninum fyri útbúgving, vísindi og mentan, sum varð settur á stovn í 1946 við endamálinum at virka fyri friði og tolsemi í heiminum, og har Føroyar fingu atlimaskap í 2009.

Fyri at røkka sínum endamáli, hevur ICOM orðað leiðreglur fyri søvn. Hesar finnast í føroyskari týðing á heimasíðuni hjá ICOM, og vórðu givnar út í bóklingi í 2017 av Søvnum Landsins. Í føroysku týðingini av leiðreglunum hjá ICOM verður eitt savn allýst soleiðis:

> *”Eitt savn við musealum virksemi er ein varandi stovnur, sum á non-profit støði virkar fyri samfelagi og menning tess, sum er opin fyri almenninginum og savnar, skrásetur, varðveitir, granskar og miðlar materiellan og immateriellan vitnisburð um fólk og umhvørvi teirra. Hetta verður gjørt til frama fyri kanningarvirksemi, útbúgving og til fragd.”*

Leiðreglurnar vísa á, hvussu viðurskiftini millum eitt savn, samfelagið tað virkar í og tað einstaka savnsstarvsfólkið eiga at vera. Leiðreglurnar snúgva seg um etisk evni, og umboða tí ein grundleggjandi hugburð, sum eigur at liggja sum grundarlag undir eini savnslóggávu.

Søvn hava vegna tað almenna framíhjárætt at innlima verk, gripir, lívfrøðilig sløg ella sýni í savningar sínar, ið hava listasøguligan, mentanarsøguligan ella náttúrusøguligan týdning. Hesir lutir mugu vera væl vardir móti at forfarast, móti privatari savnaratrongd, stuldri, fíggjarligari úrnýtslu ella oyðilegging. Eisini hava søvn skyldu til at hava savningarnar atkomuligar hjá almenningi og gransking. Lágmarksstandardur, professionalisering av starvsliðinum og ávísing av samfelagsligu skyldunum hjá søvnum eru tí týðandi partur av leiðreglunum.

Fleiri føroysk søvn eru limir í ICOM gjøgnum limaskap í ICOM Danmark, eins og Føroyar og Grønland hava hvør sín lim í nevndini.

Eisini í UNESCO verður arbeitt við at menna savnsøkið kring heimin. Í *UNESCO tilmæli um verju og fremjan av søvnum og savninum, teirra fjølbroytni og leikluti í samfelagnum*, sum varð samtykt á aðalfundinum hjá UNESCO í 2015, verða søvn og teirra virksemi lýst sum týðandi støð fyri útbúgving, sosialum samanhangi og burðardyggari menning. Víst verður á, at tað at verja og fremja náttúru og mentanarliga margfeldið eru millum størstu avbjóðingar í 21. øld, og at søvnini eru bestu miðlar at tryggja siðaarv, mentanararv og náttúruarv mannaættarinnar.

Føroyar hava tikið undir við UNESCO sáttmálanum um vernd av heimsins mentanararvi og náttúruarvi frá 1972 og við UNESCO sáttmálanum um verju av siðaarvi frá 2003. Lond, ið hava bundið seg til sáttmálarnar, skulu virka fyri at mentanararvur og náttúruarvur og siðaarvur landsins er tryggjaður til komandi ættarlið.

Føroyar hava eisini tikið undir við UNESCO sáttmálanum um vernd av mentanarvirðum í vápnaðum stríði við tilhoyrandi protokol frá 1954 og 1999 (Haag sáttmálin). Í sáttmálanum eru ásetingar um tiltøk at tryggja mentanarvirði skuldi vápnað stríð brostið á í Føroyum.

**Endamálið við uppskotinum**

Endamálið við lógaruppskotinum er, at savnsvirksemið hjá landinum innan mentanarsøgu, náttúrusøgu og list fær ein felags lógarkarm at virka undir, ið tryggar dygd, menning og samstarv. Dygdargóðar savnstænastur, støðug menning og samstarv, bæði sínámillum, við almenningin, skúlaverkið og myndugleikar eru við til at kjølfesta søvnini sum stovnar, sum eru týðandi fyri fólkaræðið, fyri savningarmegina og vitanarstøðið í landinum og sum støð, har almenningurin tekur lut.

Málið er, at søvnini skulu menna sín leiklut sum deplar fyri uppliving og vitan og harvið koma við íkasti til mentanarligu, sosialu og búskaparligu menningina av samfelagnum. Søvnini eru týðandi fyri fatanina av føroyska samfelagnum og sambandinum við umheimin, og søvnini eru við til at gera listina, mentanararvin og náttúruarvin viðkomandi fyri okkum øll.

Søvnini hava ein týðandi leiklut í menningini av einum fjølbroyttum og burðardyggum samfelagi eins og tey eru týðandi fyri menning og tilknýti hjá einstaka borgaranum.

Søvnini hava eisini ein týðandi leiklut í samfelagsmenningini, eitt nú í menningini av bygda- og býarlívi, av kreativu vinnunum og ferðavinnuni. Tað er eitt aðalmál, at søvnini eru opin, rúmshátt og atkomulig hjá øllum, og at søvnini í sínum virksemi miða ímóti margfeldi í

breiðum týdningi; tað veri seg í mun til aldur, kyn, kynsligan samleika, uppruna, trúgv og sosiala støðu.

Áherðsla verður løgd á, at søvnini eru støð, har øll børn og ung kunnu taka lut, fáa góðar upplivingar og menna sína fatan av mentan, list, náttúru og vísind.

Søvn hava ein sosialan leiklut, og dentur verður lagdur á, at søvnini kunnu bjóða borgarum tænastur, ið eru lagaðar til ymsar málbólkar, eitt nú til tilflytarar, eldri borgarar og borgarar við heilsuligum ella sálarligum avbjóðingum.

Áherðsla verður løgd á, at virksemið á søvnunum er í tráð við ST sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek frá 2009. Sáttmálin staðfestur borgarlig og sivil mannarættindi, hevur ásetingar um búskaparlig, mentanarlig og sosial rættindi, umframt rættin til atkomu í víðari merking.

Høvuðssøvn
Í lógaruppskotinum verður ásett, at Tjóðsavnið, Jarðfeingi og Listasavn Føroya røkja uppgávuna sum høvuðssøvn innan síni øki. Tað merkir, at tey ganga undan í savnsspurningum innan síni øki, og halda umboðandi savningar fyri alt landið. Høvuðssøvnini ráðgeva landsstýrimanninum og øðrum myndugleikum, vegleiða og samstarva sínámillum og við onnur søvn, myndugleikar og stovnar.

Partur av virkseminum hjá høvuðssøvnunum er at veita savnsfakliga vegleiðing. Vegleiðingin umfatar t.d. trygdarspurningar, millumtjóða samstarv, fakligar spurningar viðvíkjandi verkum og gripum, konservering og goymslum, t.e. innsavning, skráseting, varðveiting, gransking og miðlan av lutum.

Samstarvið millum søvnini kann fevna um innsavning, skráseting, útlán av verkum og gripum og felags kanningar, gransking, framsýningar og miðlan.

Høvuðssøvnini samstarva við skúlaverkið um savnstænastur til børn og ung, og við myndugleikar, søvn, stovnar og feløg um savnstænastur, ið verða lagaðar ymsum bólkum av borgarum, so sum sjónveikum, eldri borgarum og tilflytarum.

Tjóðsavnið
Tjóðsavnið røkir uppgávuna at vera mentanarsøguligt og náttúrusøguligt høvuðssavn fyri landið. Stovnurin rekur savnsvirksemi gjøgnum innsavning, varðveiting, gransking, framsýning og aðra miðlan av náttúruarvi og mentanararvi Føroya, og hevur harafturat uppgávur innan ráðgeving, lógarumsiting, stuðulsveiting, fakligt eftirlit og umsiting og umsjón av friðaðum landsognum og fornminnum. Tjóðsavnið varðar av fornfrøðiligum útgrevstrum og fornminnaskráseting kring landi. Tjóðsavnið er eisini umsiting hjá Fornminnisnevndini.

Tjóðsavnið er umboðað í Yvirfriðingarnevndini sambært løgtingslóg um náttúruvernd og hevur eisini loyvisumsiting í sambandi við fuglaveiðu um hendi, eins og hvalagranskingina, sum er staðsett á Tjóðsavninum og fíggjað av Fiskimálaráðnum. Tjóðsavnið umsitur Koltur, sum hevur egið rakstrarstað á løgtingsfíggjarlógini. Stjórin á Tjóðsavninum, landsantikvar-urin, umsitur stuðulsjáttanirnar til bygdasøvn og mentanarsøgulig skip. Mentamálaráðið hevur lagt umsitingina av stuðli til onnur listasøvn og Sjósavnið til Tjóðsavnið. Tjóðsavnið umsitur eisini løgujáttanirnar til Hvalastøðina við Áir og Kirkjubømúrin.

Ætlanin er, at virksemið hjá Tjóðsavninum verður skipað við reglugerð eins og virksemið hjá øðrum almennum stovnum so sum Jarðfeingi og Landsverk. Reglugerðin fyri Tjóðsavnið skal skipa stovnin við heimildum, stovnsskipan og starvsøkjum.

Tjóðsavnið heldur til ymsastaðni í høvuðsstaðnum, í Kúrdali, úti á Debesartrøð og í Kaldbak. Høvuðsframsýningin er í Brekkutúni 6 í Hoyvík, har Tjóðsavnið sýnir fram saman við Jarðfeingi. Síðan Fornminnissavnið og Náttúrugripasavnið vórðu sett á stovn, hevur javnan verið tosað um at byggja søvnunum høli, ið eru ætlað til endamálið. Bygningurin í Brekkutúni 6 var keyptur at hýsa vaksandi savningunum í 1994, og tá framsýningin var sett upp í 1996, var tað ætlað sum ein fyribilsloysn í 10 ár. Hølini í Brekkutúni eru á einum nøktandi støði í mun til goymslu av savningunum hjá Tjóðsavninum, men hølini eru ikki nóg rúmshátt at hýsa fjølbroytta virkseminum, og staðsetingin er ikki væl egnað til framsýningar.

Nettoútreiðslujáttanin til Tjóðsavnið á løgtingsfíggjarlógini fyri 2018 er kr. 15.927.000 iroknað kr. 326.000 í inntøkum og nettoútreiðslujáttanin til Koltursætlanina er kr. 1.467.000. Tjóðsavnið umsitur stuðulsjáttanina til bygdasøvn, sum er kr. 2.462.000, onnur listasøvn, sum er kr. 120.000, stuðulsjáttanina til sjósavn, sum er kr. 434.000 og stuðulsjáttan til mentanarsøgulig skip, sum er kr. 850.000. Tjóðsavnið umsitur hvalagransking, hvalateljing o.a. fyri Fiskimálaráðið fyri kr. 1.107.000. Harafturat eru løgujáttanir til Kirkjubømúrin, sum er kr. 1.300.000 og hvalastøðina við Áir, sum er kr. 1.000.000.

Jarðfeingi
Jarðfeingi er jarðfrøðiligur kanningarstovnur fyri landið. Stovnurin rekur jarðfrøðiligt kanningararbeiðið og fyrisiting innan jarðvísindi á landi og havøkinum, innan oljuleiting og jarðfeingi sum heild á landi og havøkinum. Hetta umfatar savnsvirksemi gjøgnum innsavning, varðveiting, gransking, miðlan og framsýning av jarðvísindaliga náttúruarvi Føroya. Harafturat hevur Jarðfeingi uppgávur innan ráðgeving, undirvísing, lógarumsiting og eftirliti við kolvetnisleitiloyvir.

Jarðfeingi er ikki umboðað í Yvirfriðingarnevndini og hevur víst á tørvin á, at náttúruvernd eisini fatar um jarðvísindaligar avbjóðingar.

Jarðfeingi er skipað undir Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum við reglugerð frá 2005.

Nettoútreiðslujáttanin til Jarðfeingi á løgtingsfíggjarlógini 2018 er kr. 8.736.000, ikki íroknað inntøkur.

Framsýningin hjá Jarðfeingi er skipað í samstarvi við Tjóðsavnið, sum rindar fyri hálvan savnslærara á Tjóðsavninum. Umsitingin hjá Jarðfeingi heldur til í leigaðum hølum í Jóannesar Paturssonargøtu.

Listasavn Føroya
Listasavn Føroya er listasavn fyri landið. Virkisøkið savnsins er føroysk myndlistasøga og nútíðar yvirbragd. Harafturat kemur útlendsk myndlist í tann mun, ið myndlistin hevur havt ella hevur týdning fyri føroyska myndlist. Stovnurin rekur savnsvirksemi gjøgnum innsavning, skráseting, varðveiting, gransking, framsýning og aðra miðlan.

Listasavn Føroya ráðgevur Mentamálaráðnum, landsantikvarinum og øðrum almennum myndugleikum viðvíkjandi spurningum um myndlist, og ráðgevur eisini øðrum føroyskum listasøvnum, sum eru alment stuðlað.

Nettoútreiðslujáttanin til Listasavn Føroya á løgtingsfíggjarlógini 2018 er kr. 2.234.000. Inntøkur eru kr. 1.300.000.

Hølisviðurskiftini hjá søvnunum verða ikki skipað sambært lógaruppskotinum. Tað er tó av avgerandi týdningi, at søvnini hava trygg og góð hølisviðurskifti, bæði tá tað snýr seg um goymsluviðurskifti, framsýningarhøli og starvshøli.

Listasavn Føroya heldur til í Listaskálanum í Gundadali, sum varð bygdur í 1970 og útbygdur í 1993. Hølini liggja væl fyri, men eru ikki nóg rúmshátt. Stýrið fyri Listasavn Føroya hevur seinnu árini arbeitt við ætlanum um enn eina útbygging av Listasavni Føroya.

Menning av savnsøkinum
Ein týðandi táttur í lógaruppskotinum er at fáa skipaðar karmar fyri menning av savnsøkinum. Høvuðstættirnir í menningini eru ráðgeving, menning av tænastum og stuðulsveiting.

Eitt savnsráð verður sett at ráðgeva landsstýrismanninum og øðrum myndugleikum í yvirskipaðum savnsmálum og at fyriskipa átøk og tiltøk at menna tænasturnar á savnsøkinum. Tað kann snúgva seg um tilmæli til landsstýrismannin, hagtøl og kanningar, førleikamenning og fyriskipan av felags tiltøkum.

Ein týðandi táttur hjá savnsráðnum er at virka fyri, at savnsvirksemi í landinum er í tráð við altjóða leiðreglur hjá ICOM og tilmæli frá UNESCO.

Tað er landsstýrismaðurin, ið ger av, hvørjar uppgávur verða lagdar til Savnsráðið. Eitt nú kann landsstýrismaðurin leggja umsiting av stuðli til savnsráðið at umsita.

Landsstýrismaðurin kann manna savnsráðið við umboðum fyri kommunurnar, skúlaverkið, søvn og ferðavinnuna. Høvuðssøvnini eru altíð umboðað í savnsráðnum við hvør sínum fasta limi.

Stuðul
21 góðkend bygdasøvn fáa stuðul frá landinum sambært løgtingslóg um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi. Tey eru Sunnbiar Sóknar Bygdasavn, Vágs Bygdasavn, Porkeris Bygdasavn, Fornminnissavnið á Mýri í Hovi, Tvøroyrar Bygdasavn, Hvalbiar sóknar bygda- og kolasavn, Skúvoyar bygdarsavn, Sands Bygdasavn, Skopunar Bygdasavn, Miðvágs Bygdasavn, Sørvágs Bygdasavn, Nólsoyar Bygdasavn, Vestmanna Bygdarsavn, Kollafjarðar Bygdasavn, Tórshavnar Býarsavn, Sjóvar Fornminnasavn, Eiðis Bygdasavn, Gøtu Bygdasavn, Bygdasavnið Forni í Runavíkar kommunu, Bygdasavnið í Nes kommunu og Norðoya Fornminnissavn. Bygdasøvnini eru øll mentanarsøgulig søvn.

Umframt hesi eru sjey søvn, sum fáa stuðul úr landskassanum, men eru ikki skipað sambært aðrari lóggávu. Tey eru trý listasøvn, tvey mentanarsøgulig søvn og tvey náttúrusøgulig søvn, nevniliga hesi: Skálin við Skálá í Vági, Listasavnið á Sandi, Norðoya Listafelag, Felagið Krígssavnið, Sjósavnið á Argjum, Rocksavn og Undirsjóvarsavn í Klaksvík. Hesi bæði seinnu komu á løgtingsfíggjarlógina í 2018, og eru undir stovnan.

Sambært galdandi lóggávu og delegatión úr Mentamálaráðnum er tað landsantikvarurin, sum umsitur stuðulsjáttanirnar til bygdasøvn. Við delegatión úr Mentamálaráðnum umsitur Tjóðsavnið eisini stuðul til onnur listasøvn og til Sjósavnið.

Mentamálaráðið umsitur stuðulin til Krígssavnið, Rocksavn og Undirsjóvarsavn. Mentamálaráðið hevur eisini sett stuðul til verkætlanina víkingaskip í Hovi á langtíðarløgujáttanina.

Í mun til dygd og dupultfunktiónir hjá tí almenna, er tað óheppið, at stuðulin til søvn verður umsitin í fleiri støðum, og lógaruppskotið letur tí upp fyri, at landsstýrismaðurin kann savna umsitingina av stuðli hjá savnsráðnum. Á henda hátt ber til at fáa eina samlaða og fakliga dygga stuðulsumsiting, tí høvuðssøvnini eru øll umboðað í savnsráðnum.

Bygdasøvnini eru ymisk í støðd og flestu teirra eru smá. Summi teirra hava lønt fólk í starvi, ímeðan tey flestu grunda virksemi sítt á sjálvbodna arbeiðsmegi. Eingi serlig krøv verða í dag sett til fakligan førleika. Hóast tey øll eru liður í samlaða savnsvirkseminum hjá landinum, so megna flestu teirra vegna støddina ikki at røkja uppgávurnar innsavning, skráseting, varðveiting, gransking, framsýning og aðra miðlan til fulnar, og kunnu sostatt ikki metast sum søvn sambært leiðreglunum hjá ICOM.

Menningarmøguleikarnir á savnsøkinum eru stórir, og har eru stuðulsskipanir til søvnini ein týðandi liður. Ætlanin er at dagføra stuðulsskipanirnar á savnsøkinum í serstakari lóggávu fyri økið.

**Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Við lógaruppskotinum verður savnsvirksemið hjá landinum skipað í ein felags lógarkarm, og savnslóggávan verður dagførd, so hon svarar til bygnaðin á savnsøkinum.

Søvnini, sum landið rekur innan mentanarsøgu, náttúrusøgu og list verða skipað sum høvuðssøvn og tað merkir, at tey skulu ganga undan í savnsspurningum, ráðgeva myndugleikum og samstava við myndugleikar, søvn og aðrar partar. Ein týðandi uppgáva er at skipa serligar savnstænastur fyri børn og ung, og at menna savnstænastur, ið eru lagaðar bólkum, ið hava serligan tørv á hesum, eitt nú tilflytarum, eldri borgarum og borgarum, ið hava heilsuligar ella sálarligar avbjóðingar.

Lógaruppskotið er í tráð við altjóða leiðreglur og tilmæli, og tað merkir, at søvnini, ið landið rekur og tey søvn, ið landið stuðlar, skulu virka eftir somu leiðreglum og standardum, sum søvn í øllum heiminum virka eftir.

Eitt savnsráð verður skipað at ráðgeva landsstýrismanninum í savnsspurningum og standa fyri átøkum og tiltøkum at menna savnsøkið. Talan kann eitt nú verða um at gera kanningar, menna hagtøl, skipa fyri førleikamenning og felags tiltøkum.

Í lógaruppskotinum eru eisini ásetingar um útvegan og úrskiljing av verkum og gripum, um fígging og fyrisiting.

**Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar enn.

Ummælini verða løgd við sum fylgiskjal til lógaruppskotið.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar í mun til raksturin av høvuðssøvnunum. Tey hava hvør sína rakstrarjáttan á løgtingsfíggjarlógini, og røkja longu í stóran mun tær uppgávur, sum lógaruppskotið ásetur. Tó leggur lógaruppskotið dent á, at høvuðssøvnini eiga at samstarva við skúlaverkið, myndugleikar og feløg um savnstænastur, ið laga seg eftir ávísum málbólkum. Her verður eitt nú hugsað um tænastur til børn og ung, tilflytarar, eldri borgarar og borgarar, ið hava heilsuligar ella sálarligar avbjóðingar, og tí eigur at verða miðað eftir, at menna høvuðssøvnini fíggjarliga komandi árini, so tey hava fíggjarliga orku at menna sínar tænastur á hesum økjum.

Savnsráðið er nýtt, og neyðugt er við serstakari játtan til endamálið. Tað er landsstýrismaðurin, ið ger av, hvussu umfatandi uppgávurnar hjá savnsráðnum verða, men ynskiligt er, at savnsráðið verður raðfest, so at ráðið kann fara undir ráðgevandi og fyriskipandi uppgávur, sum tørvur er á, og sum ikki verða røktar í dag. Talan er eitt nú um at fáa til vega hagtøl, at gera tilmæli til myndugleikarnar í savnsmálum og at skipa fyri tiltøkum og førleikamenning fyri alt savnsøkið.

Mett verður, at árligi fíggjartørvurin til savnsráðið verður 1 mió. kr., harav umleið kr. 650.000 eru lønarútreiðslur og kr. 300.000 verða settar av til tiltøk og átøk. Mett verður at kr. 50.000 røkka til skrivstovuhald, treytað av, at savnsráðið verður skipað saman við aðrari umsiting, eitt nú á Tjóðsavninum.

### Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Stuðulin til søvn verður í dag umsitin av Tjóðsavninum og í minni mun av Mentamálaráðnum. Umsitingin er nøktandi í mun til viðkomandi lóggávu og ásetingarnar um stuðulsfyrisiting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan, men higartil hevur einki verið gjørt við menningina av savnsøkinum. Skulu hesar uppgávur røkjast til lítar, er neyðugt við akademiskum starvsfólki at standa fyri virkseminum hjá savnsráðnum.

Uppskotið hevur ongar serligar fíggjarligar, umsitingarligar, ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum. Lógaruppskotið fær ongar beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna ella fyri umhvørvið.

### Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### Avleiðingar fyri umhvørvið

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingarnar á umhvørvið.

### Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### Millumtjóðasáttmálar á økinum

Eingir millumtjóðasáttmálar eru á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið er í tráð við UNESCO sáttmálarnar á mentanarøkinum, sum Føroyar hava tikið undir við. Viðkomandi sáttmálar eru

- UNESCO sáttmálin um vernd av heimsins mentanar- og náttúruarvi frá 1972 (heimsarvssáttmálin). Føroyar tóku undir við sáttmálanum í 1980.

- UNESCO sáttmálin um vernd av mentanarvirðum í vápnaðum stríði við tilhoyrandi protokol frá 1954 og 1999 (Haag sáttmálin). Føroyar tóku undir við sáttmálanum í 2003.

- UNESCO sáttmálin um at banna og forða fyri ólógligum inn- og útfluttningi og ognarskifti av mentanarvirðum frá 1970. Føroyar tóku undir við sáttmálanum í 2008.

- UNESCO sáttmálanum um verju av siðaarvi frá 2003. Føroyar tóku undir við sáttmálanum í 2018.

Lógaruppskotið sampakkar við Evropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS, "Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention" við ásetingum um, at søvnini sambært lógaruppskotinum eru trygg støð, har luttøka og fjøbroytt fatan av mentan, list, náttúru og vísind nørist og mennist.

Lógaruppskotið sampakkar eisini við sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, ið varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við "Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap", við tað at uppskotið hevur ásetingar um at søvn eru atkomulig hjá øllum og at víst verður til sáttmálan í viðmerkingunum til lógaruppskotið.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### Til kapittul 1. Almennar ásetingar

**Til § 1**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Ásetingin vísir til endamálið við lógini, sum er at fremja savnsvirksemi landsins og vísir á týdningin av mentanararvi og náttúruarvi og at hesin verður varðveittur til komandi ættarlið. Víst verður eisini til almennu viðmerkingarnar.

**Til § 2, stk. 1**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Ásetingin staðfestir virkisøkið, sum er savnsvirksemið hjá landinum. Greinin ásetur, at landið rekur søvn innan mentanarsøgu, náttúrusøgu og list og landið mennir og stuðlar øðrum savnsvirksemi kring landið.

**Til § 2, stk. 2**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Á føroyskum hevur orðið savn ein breiðari týdning enn orðið museum, ið stavar úr grikskum, og sum síðan 1600 talið hevur verið brúkt um bygningar, har lutir verða sýndir fram. Greinin tilskilar, at lógin ikki fevnir um bókasavnsvirksemi ella skjalasavnsvirksemi hóast bókasøvn og skjalasøvn eisini virka fyri at tryggja, varðveita og miðla mentanar- og náttúruarv.

**Til § 3, stk. 1**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Ásetingin lýsir yvirskipað endamál og uppgávur hjá søvnunum sambært lógini. Staðfest verður, at søvn eru almannagagnligir stovnar, sum ikki hava vinning fyri eygað, men at søvnini virka fyri samfelagnum sum heild, og fyri framburði. Tað merkir, at tann vitan og teir lutir, verk, gripir og sýni, sum eru til skjals á søvnunum, skulu vera atkomulig hjá øllum, og at tann gransking, sum fer fram á søvnunum, skal tæna øllum samfelagnum.

Grundleggjandi uppgávurnar hjá søvnum eru at savna og halda savningar og skjalfestingar, sum eru umboðandi fyri fólkið og umhvørvið, at varðveita hesar fyri komandi ættarlið. Søvnini skulu menna vitan við at granska í savningunum og á sínum virkisøkjum, og sýna fram og miðla vitan og savningarnar. Søvnini eru grundleggjandi stovnar í fólkaræðinum, og víst verður á, at søvnini skulu vera trygg støð, ið eggja til samrøðu og luttøku og har rúm er fyri, at fatanin av mentan, list, náttúru og vísind er fjølbroytt og kann nørast og mennast.

Savningar sambært hesi lóg eru savningar við mentanarligum og náttúruligum eginleikum, í materiellum og immateriellum hami, í fortíð og nútíð og sum søvnini varðveita til vitnis um fólk og teirra umhvørvi.

Ásetingin er grundað á skilmarkingina hjá ICOM av, hvat eitt savn er, og á tilmæli hjá UNESCO frá 2015 um verju og fremjan av søvnum og savningum, teirra fjølbroytni og leiklut í samfelagnum.

**Til § 3 stk. 2**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Sambært ásetingini eru uppgávurnar innsavning, skráseting, varðveiting, gransking, framsýning og onnur miðlan sínámillum samanknýttar uppgávur. Hetta merkir, at innsavningin, varðveiting, framsýning og miðlan byggir á gransking innan virkisøkið, at innsavning, skráseting og varðveiting, gransking, framsýning og miðlan

skulu fara fram á dyggan hátt, og at samanhangurin innan virkisøkið, í savningunum og skjalfestingunum skal síggjast bæði úr heimligum og alheimsligum sjónarhorni. Hetta verður gjørt fyri at tryggja mentanararv og náttúruarv til nútíðina og framtíðar ættarlið.

Endamálið við at gera vitan um mentanararv og náttúruarv Føroya tíðarbæra, atkomuliga og viðkomandi er at skapa grundarlag fyri einum upplýstum samfelagi hjá verandi og komandi ættarliðum. Tær savningar og skjalfestingar, ið søvnini halda innan síni virkisøki, skulu støðugt styrkjast, og tær skulu vera atkomuligar, bæði hjá granskarum og almenningi. Mentanarsøga, náttúrusøga og listasøga eru við til at lýsa savningarnar og teir samanhangir tær innganga í. Endamálið við at menna nýtslu og týdning av mentanararvi og náttúruarvi fyri borgaran og samfelagið er at skapa gróðrarlíkindi fyri einum upplýstum samfelagi, fyri tolsemi og trivnaði.

Ásetingin er grundað á altjóða leiðreglurnar fyri savnsvirksemi hjá savnsfelagsskapinum ICOM, the International Council of Museums. Víst verður eisini til almennu viðmerkingarnar um leiklutin hjá søvnum og á tilmæli hjá UNESCO frá 2015 um verju og fremjan av søvnum og savningum, teirra fjølbroytni og leiklut í samfelagnum.

## Til kapittul 2. Høvuðssøvn

**Til § 4, stk. 1**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Sambært ásetingini rekur landið høvuðssøvn innan mentanarsøgu, náttúrusøgu og list. At vera høvuðssavn innan ávíst virkisøki merkir, at savnið er miðstøð fyri savnsvirksemi hjá landinum innan mentanarsøgu, náttúrusøgu ella list. Høvuðssøvnini verða rikin við fígging frá landinum.

**Til § 4, stk. 2**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Ásetingin lýsir uppgávurnar hjá høvuðssøvnunum, sum fevna um at ganga undan í savnsspurningum, at veita ráðgeving og samstarva við aðrar partar. Hetta merkir, at høvuðssøvnini koma við íkasti til upplýsing og samfelagsmenning innan síni virkisøki. Høvuðssøvnini ráðgeva myndugleikum, teimum søvnum, ið fáa stuðul frá landinum og øðrum í savnsspurningum og samstarva við viðkomandi myndugleikar og stovnar.

**Til § 4, stk. 3**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Høvuðssøvnini samstarva við eitt nú skúlaverkið um at veita savnstænastur, ið laga seg til ymsu stigini í útbúgvingarskipanini. Høvuðssøvnini samstarva eisini við aðrar myndugleikar og stovnar, eitt nú á almannaøkinum og heilsuøkinum um at veita savnstænastur til ávísar málbólkar, eitt nú eldri borgarar og borgarar, ið hava serligan tørv. Tað kann eitt nú snúgva seg um savnstænastur, ið laga seg til tørvin hjá borgarum, ið bera minnisbrek, eru sjónveik, hava sosialar og sálarligar trupulleikar ella sjúkueyðkenni, ið gera, at tey hava ein serligan tørv. Grundarlagið fyri ásetingini er, at søvnini skulu vera atkomulig hjá øllum, og veita savnstænastur, ið eru lagaðar til málbólkar, ið hava ymsan tørv.

**Til § 4, stk. 4**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Samstarv og samskipan millum høvuðssøvn sínámillum ella søvn, ið fáa stuðul frá landinum er grundarlag fyri dygd og skynsomum virksemi. Samstarvið og samskipanin kann snúgva seg um innsavning, skráseting, varðveiting, gransking, framsýning og aðra miðlan. Høvuðssøvnini samstarva eisini við onnur viðkomandi feløg og stovnar og við viðkomandi feløg og stovnar uttanlands.

**Til § 4, stk. 5**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Tað verður álagt høvuðssøvnunum at halda miðsavnaðar skráir, ið lúka altjóða standardar á økinum.

Innan mentanarsøgu brúkar Tjóðsavnið miðsavnaðu skránna Sara, sum Slots- og Kulturstyrelsen í Danmark bjóðar føroyskum søvnum ókeypis.

Miðað verður eftir, at miðsavnaðar skráir eisini verða tøkar innan náttúrusøgu og list. Endamálið við miðsavnaðu skráunum er at tryggja yvirlit og atgongd til vitan um mentanararv, náttúruarv og list, nú og í framtíðini.

**Til § 4, stk. 6**
Ásetingin er nýggj. Endamálið við ásetingini er at staðfesta, at høvuðssøvnini kunnu útvega sær aðra fígging við inntøkufíggjaðum virksemi, gjøgnum stuðulsveiting úr grunnum og líknandi og við sølu av tænastum og líknandi.

**Til kapittul 3. Mentanarsøguligt høvuðssavn**

**Til § 5, stk. 1**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Í ásetingini verður staðfest, at landið rekur mentanarsøguligt høvuðssavn. Víst verður eisini til almennu viðmerkingarnar.

**Til § 5, stk. 2**
Ásetingin er partvís nýggj og partvís ein umorðing í mun til galdandi ásetingar í § 2, nr. 3 í løgtingslóg nr. 32 frá 2. mai 1952 um fornminnissavn. Ásetingin staðfestir, at tað mentanarsøguliga høvuðssavnið skal lýsa mentan í Føroyum og bundinskap hennara at mentanum heimsins, og at høvuðssavnið skal lýsa broyting, fjølbroytni og gongdina í lívskorum hjá fólki.

**Til § 5, stk. 3**
Ásetingin er ein umorðing í mun til galdandi áseting í § 2, nr. 3 og 4, í løgtingslóg nr. 32 frá 2. mai 1952 um fornminnissavn. Ásetingin staðfestir at tað er uppgávan hjá mentanarsøguliga høvuðssavninum at stovna og halda umboðandi savningar og skjalfestingar fyri mentanarsøgu í Føroyum. Høvuðssavnið fær lutir gjøgnum fornfrøðiligt virksemi, við avhending til savnið av fundum og lutum og gjøgnum innsavning. Innsavning av mentnarsøguligum lutum úr nýggjari tíð fer fram sum eitt felags mál hjá mentanarsøguliga høvuðssavninum og teimum mentanarsøguligu søvnunum, ið fáa stuðul frá landinum. Við atliti at kravinum um umboðandi savningar fer arbeiðsbýtið millum mentanarsøguliga høvuðssavnið og onnur mentanarsøgulig søvn fram í samstarvi millum høvuðssavnið og viðkomandi mentanarsøguligu søvn.

**Til § 5, stk. 4**
Ásetingin er partvís nýggj og partvís ein umorðing í mun til galdandi ásetingar í § 2, nr. 3 og 4 í løgtingslóg nr. 32 frá 2. mai 1952 um fornminnissavn. Ásetingin vísir á, at savningar og skjalfestingar eru støði undir gransking og framsýningum og aðrari miðlan hjá høvuðssavninum. Víst verður eisini til viðmerkingarnar til § 3 stk. 1 og 2.

Ásetingin staðfestir skyldurnar hjá høvuðssavninum at granska, sýna fram og miðla á mentanarsøguliga økinum.

**Til § 5, stk. 5**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóg um fornminnissavn. Ásetingin staðfestir, at tað mentanarsøguliga savnið hjá landinum, grundað á savningar tess og uppgávuna sum mentanarsøguligt høvuðssavn, hevur eina serliga skyldu til at sjónliggera og perspektivera savningarnar við at luttaka í millumtjóða samstarvi.

**Til § 5, stk. 6**
Ásetingin er ein umorðing í mun til galdandi ásetingar í § 2, nr. 1 og 2, í løgtingslóg um fornminnissavn og § 1, stk. 3, í løgtingslóg nr. 92 frá 21. desember 2004 um vernd av fornlutum í havinum. Ásetingin staðfestir, at mentanarsøguliga høvuðssavnið varðar av øllum fornfrøðiligum kanningum í Føroyum og í føroyskum sjóøki. Tað merkir, at tað er mentanarsøguliga høvuðssavnið, ið stendur fyri øllum fornfrøðiligum virksemi í landinum.

**Til § 5, stk. 7**
Ásetingin er ein umorðing í mun til galdandi ásetingar í § 2, nr. 1, í løgtingslóg um fornminnissavn. Ásetingin staðfestir, at tað er uppgávan hjá mentanarsøguliga høvuðssavninum at umsita friðað fornminni og friðaðar bygningar, og at mentanarsøguliga høvuðssavnið er umsiting hjá fornminnamyndugleikunum.

**Til § 5, stk. 8**
Við ásetingini verður víst á, at høvðussavnið hevur aðrar álagdar uppgávur, ið ikki er ásettar í hesi lóg. Eitt nú umsitur Tjóðsavnið stuðulin til mentanarsøgulig skip og stuðulin til bygdasøvn. Eisini kann landsstýrismaðurin áleggja høvuðssavninum uppgávur, ið ikki eru fevndar av serstakari lóggávu, eitt nú uppgávur, ið eru álagdar í sambandi við UNESCO atlimaskap Føroya.

**Til § 5, stk. 9**
Ásetingin er nýggj. Við ásetingini verður staðfest, at Tjóðsavnið er mentanarsøguliga høvuðssavn Føroya.

**Til kapittul 4. Náttúrusøguligt høvuðssavn**

**Til § 6, stk. 1**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Í ásetingini verður staðfest, at landið rekur náttúrusøguligt høvuðssavn. Víst verður eisini til almennu viðmerkingarnar.

**Til § 6, stk. 2**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Ásetingin staðfestir, at tað er uppgávan hjá náttúrusøguliga høvuðssavninum at lýsa kunnleikan til jarðfrøði, jarðalisfrøði, dýr, plantur og annan vitnisburð, sum kann lýsa náttúruna frá upphavi til okkara tíð. Náttúrusøguliga høvuðssavnið skal lýsa náttúruna, søguligu gongdina í henni, nútíðar umhvørvið og samspælið við menniskjað.

**Til § 6, stk. 3**
Ásetingin er partvís nýggj og partvís ein umorðing í mun til galdandi áseting í § 2, pkt. a og b, í løgtingslóg nr. 26 frá 17. august 1955 um Føroya Náttúrugripasavn. Ásetingin staðfestir at tað er uppgávan hjá náttúrusøguliga høvuðssavninum at stovna og halda umboðandi savningar og skjalfestingar fyri føroyska náttúru innan djórafrøði, plantufrøði og jarðfrøði. Høvuðssavnið

fær lutir og sýni gjøgnum við avhending til savnið av fundum og lutum og gjøgnum innsavning. Við atliti at kravinum um umboðandi savningar fer arbeiðsbýtið millum náttúrusøguliga høvuðssavnið og onnur náttúrusøgulig søvn ella stovnar fram í samstarvi millum høvuðssavnið og viðkomandi náttúrusøguligu søvn ella stovnar.

**Til § 6, stk. 4**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóg um náttúrugripasavn. Ásetingin staðfestir, at náttúrusøguliga høvuðssavnið, grundað á savningarnar og uppgávuna sum náttúrusøguligt høvuðssavn, hevur eina serliga skyldu til at sjónliggera og perspektivera savningarnar við at luttaka í millumtjóða samstarvi.

**Til § 6, stk. 5**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóg um náttúrugripasavn. Ásetingin vísir á, at savningar og skjalfestingar eru støði undir gransking og framsýningum og aðrari miðlan hjá høvuðssavninum. Víst verður eisini til viðmerkingarnar til § 3 stk. 1 og 2.

Ásetingin staðfestir skyldurnar hjá høvuðssavninum at granska, sýna fram og miðla á náttúrusøguliga økinum.

**Til § 6, stk. 6**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóg um náttúrugripasavn. Ásetingin staðfestir, at náttúrusøguliga høvuðssavnið varðar av náttúrufrøðiligum tilfari og kanningum og skrásetingum innan síni øki á sjógvi og á landi. Tað merkir, at tað er náttúrusøguliga høvuðssavnið, ið stendur fyri náttúrufrøðiligum virksemi innan síni øki í landinum.

**Til § 6, stk. 7**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóg um náttúrugripasavn. Við ásetingini verður víst á, at høvðussavnið kann hava aðrar álagdar uppgávur, ið ikki er ásettar í hesi lóg. Eitt nú hevur Tjóðsavnið loyvisumsiting í sambandi við fuglaveiðu um hendi. Eisini kann landsstýrismaðurin áleggja høvuðssavninum uppgávur, ið ikki eru fevndar av serstakari lóggávu, eitt nú uppgávur, ið eru álagdar í sambandi við UNESCO atlimaskap Føroya.

**Til § 6, stk. 8**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóg um náttúrugripasavn. Við ásetingini verður staðfest, at Tjóðsavnið er náttúrusøguliga høvuðssavn Føroya, undantikið tó á jarðfrøðiliga økinum, har Jarðfeingi er høvuðssavn. Ásetingin ávirkar ikki staðseting savnanna í málsøkjabýti landsstýrismanna.

**Til kapittul 5. Høvuðslistasavn**

**Til § 7, stk. 1**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Í ásetingini verður staðfest, at landið rekur høvuðslistasavn. Víst verður eisini til almennu viðmerkingarnar.

**Til § 7, stk. 2**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Uppgávan hjá høvuðslistasavninum hevur ikki áður verið skipað við løgtingslóg. Ásett verður, at tað er uppgávan hjá høvuðslistasavninum at lýsa føroyska myndlist og myndlist, sum er viðkomandi fyri landið, í fortíð og nútíð. Ásett verður, at høvuðslistasavnið lýsir myndlistasøguna, áleikandi listarlig yvirbragd og fagurfrøðiliga og fatanarliga vav hennara. Myndlist er felagsheiti fyri málningar, skulpturar, standmyndir, tekningar, grafikk og aðra list.

**Til § 7, stk. 3**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Ásetingin staðfestir, at høvuðslistasavnið skal stovna og halda eina umboðandi savning fyri føroyska myndlist. Innsavning av list í Føroyum eigur at fara fram í samstarvi millum Listasavn Føroya og onnur listasøvn fyri at tryggja fjølbroytni í savningunum.

**Til § 7, stk. 4**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Ásetingin staðfestir, at Listasavn Føroya, grundað á savningar tess og uppgávuna sum listasøguligt høvuðssavn, hevur eina serliga skyldu til at sjónliggera og perspektivera savningarnar við at luttaka í millumtjóða samstarvi.

**Til § 7, stk. 5**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Ásetingin vísir á, at savningar og skjalfestingar eru støði undir gransking og framsýningum og aðrari miðlan hjá høvuðslistasavninum. Høvuðslistasavnið hevur eina serliga skyldu til gjøgnum fastar framsýningar og skiftandi evnisframsýningar at upplýsa alment um føroyska listasøgu í fortíð og nútíð. Víst verður eisini til viðmerkingarnar til § 3 stk. 1 og 2.

**Til § 7, stk. 6**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Við ásetingini verður víst á, at høvðuslistasavnið kann hava aðrar álagdar uppgávur, ið ikki er ásettar í hesi lóg. Eitt nú kann landsstýrismaðurin, í samráði við stýrið fyri høvuðslistasavnið, áleggja savninum uppgávur í sambandi við umsiting av stuðli. Eisini kann landsstýrismaðurin, í samráði við stýrið fyri høvuðslistasavnið, áleggja høvuðslistasavninum uppgávur, ið ikki eru fevndar av serstakari lóggávu, eitt nú uppgávur, ið eru álagdar í sambandi við UNESCO atlimaskap Føroya.

**Til § 7, stk. 7**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Við ásetingini verður staðfest, at sjálvsognarstovnurin Listasavn Føroya er høvuðslistasavn Føroya.

**Til kapittul 6. Menning av savnsvirksemi landsins**

**Til § 8**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Ásett verður, at landsstýrismaðurin varðar av og skipar fyri menning av samlaða savnsvirksemi landsins. Víst verður til §§ 9 og 10.

**Til § 9, stk. 1**
Ásetingin er nýggj. Sambært lógaruppskotinum setir landsstýrismaðurin eitt savnsráð, sum skal ráðgeva landsstýrismanninum savnsmálum. Talan er um yvirskipaða ráðgeving, so sum ráðgeving í sambandi við skipan av savnsøkinum, orðing av savnspolitikki og øðrum

frágreiðingum. Savnsráðið skal eisini skipa fyri átøkum og tiltøkum at menna savnsøkið. Talan kann vera um førleikamenning, felags savnsdagar, ráðstevnur, verkstovur og líknandi tiltøk.

**Til § 9, stk. 2**
Ásetingin er nýggj. Ásett verður, at savnsvirksemi hjá landinum skal vera í tráð við altjóða leiðreglur og tilmæli á savnsøkinum. Tað merkir, at savnsráðið virkar fyri, at leiðreglurnar hjá ICOM og tilráðingin hjá UNESCO um verju og fremjan av søvnum og savningum, teirra fjølbroytni og leikluti í samfelagnum verða brúkt sum fyrimyndir fyri tí savnsvirksemi, ið landið rekur og stuðlar.

**Til § 9, stk. 3**
Ásetingin er nýggj. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um savnsráðið, hvørjar uppgávur, savnsráðið skal røkja, hvussu savnsráðið er sett saman, og hvør er umboðaður í savnsráðnum. Ráðið kann eitt nú verða mannað við umboðum fyri savnsøkið, Fróðskaparsetrið, kommunur, ferðavinnu og skúlaverkið. Ásett er, at mentanarsøguliga høvuðssavnið, náttúrusøguliga høvuðssavnið og høvuðslistasavnið altíð eru umboðað í savnsráðnum. Endamálið er at tryggja munagott samstarv og samskipan á savnsøkinum.

**Til § 10**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Ásetingin staðfestir, at landsstýrismaðurin veitir stuðul til savnsvirksemi. Talan er um savnsvirksemi, ið fær stuðul sambært serstakari lóggávu og eftir nærri reglum, ið landsstýrismaðurin ásetur. 21 bygdasøvn eru góðkend og fáa stuðul sambært bygdasavnslógini. Harafturat fáa 7 søvn stuðul sambært løgtingsfíggjarlógini. Víst verður eisini til almennu viðmerkingarnar.

**Til kapittul 7. Serligar ásetingar**

**Til § 11, stk. 1**
Ásetingin er nýggj. Føroyar tóku í 2008 undir við UNESCO-sáttmálanum frá 14. november 1970 um at banna og forða fyri ólógligum innflutningi og útflutningi og ognarskifti av mentanarvirðum. Sambært grein 7 í sáttmálanum skulu lond, sum hava tikið undir við honum, taka neyðug stig í heimligu lóggávuni til at forða, at søvn og líknandi stovnar ogna sær lutir, sum eru ólógliga útfluttir úr einum øðrum landi eftir at sáttmálin var settur í verk. Ásetingin sipar til støðuna, har tað í einum ítøkiligum máli kann verða víst til ein sáttmála, sum bæði útflutningslandið og Føroyar hava tikið undir við.

Viðvíkjandi vanliga spurninginum um útveganir hjá søvnum av lutum, har forsøgan er ógreið, skal viðmerkjast, at søvn eiga at fylgja etisku leiðreglunum, sum eru samtyktar av altjóða savnsfelagsskapinum ICOM. Í hesum reglum verður ásett, at "Eingin lutur og einki lívfrøðiligt slag eigur at verða innsavnað sum keyp, gáva, lán, arvur ella sum umbýti, uttan so at savnið er sannført um, at ognarrætturin hevur rættargildi. Skjalprógv um lógligan ognarskap í einum landi merkir ikki altíð tað sama sum rættargildur ognarrættur."

**Til § 11, stk. 2**
Ásetingin er nýggj. Ásett verður, at er ein útvegan av luti farin fram í stríð við ásetingarnar í § 11, stk. 1, so skal luturin berast aftur í samsvari við altjóða sáttmálan og viðkomandi leiðreglur. Víst verður til UNESCO sáttmálan um at banna og forða fyri ólógligum innflutningi og útflutningi og ognarskifti av mentanarvirðum frá 1970.

**Til § 12**
Ásetingin er nýggj. Ásetingin staðfestir, at høvuðssøvn ella søvn, ið fáa stuðul frá landinum, bert kunnu skilja út verk ella gripir úr savningum sínum við loyvi frá landsstýrismanninum.

Tað fremur dygd í innsavningini at tálma vraking, og hetta skal eisini síggjast í sambandi við, at savningarnar eru uppbygdar yvir mong ár, og at metingin av mentanarsøguligum, náttúrusøguligum ella listasøguligum virði kann skifta yvir tíð. Savningarnar lýsa tí í sjálvum sær, hvat varð hildið at vera munandi varðveitingarvirði um tað mundið, tá innsavningin fór fram.

Savningarnar hjá einum savni er teir lutir, sum eru keyptir av savninum, latnir savninum sum gáva ella fingnir gjøgnum innsavning ella útgrevstur. Vanliga verða lutir, sum innganga í savningarnar, innskrivaðir í ognarlista, talmerktir og skrásettir. Innsavning fer fram eftir leiðreglunum hjá ICOM, m.a. leiðregluna um uppruna og høviligt nærlagni, sum sigur, at áðrenn tikið verður ímóti einum luti ella slagi eigur alt at verða gjørt fyri at tryggja, at luturin ella slagið, sum verður boðið savninum sum keyp, gáva, lán, arvur ella umbýti, ikki er ólógliga útvegað. Høviligt nærlagni í sambandi við hetta eigur at fáa til vega alla søguna hjá lutinum, eftir at hann varð funnin ella framleiddur.

Lutir eru partur av savningunum hjá einum savni, tá lutirnir er í varðveitslu á savninum og avgerð er tikin um at innlima lutin í savningarnar. Lutir, har støða enn ikki er tikin um innliman, verða mettir sum deponerað fæ og verða skrásettir sum annað deponerað fæ í samsvari við hetta, tað vil siga at teir eru fevndir av trygdarreglum og tryggingum hjá savninum.

Høvuðsreglan er, at søvn einans útvega sær lutir fyri at innlima teir í savningarnar. Har tað í sambandi við gávu ella keyp er talan um eina samlaða útvegan, sum lutvís umfatar lutir, sum savnið ynskir at innlima í savningarnar, og lutvís lutir, sum ynski ikki er um at innlima, innganga teir síðst nevndu ikki í savnið, men verða straks avhendir, soleiðis at tað ikki verður talan um eina vraking úr savningum savnsins.

Lutir, sum verða nýttir í sambandi við undirvísing og líknandi, og sum eru fingnir til vega til hetta endamál, verða ikki mettir sum partar av savningunum. Tað sama er galdandi fyri modell av lutum.

Ásetingarnar um vraking forða ikki fyri, at søvn kunnu gera kanningar av einum luti hóast avleiðingin er, at ein noyðist at oyðileggja hann fyri at kunna gera kanningina, eitt nú kolevni 14-kanningar ella dendrokronologiskar kanningar.

Í sambandi við útdeponeringar kunnu søvnini seta krøv um varðveitslutrygd eftir ítøkiligari meting. Útdeponeraðir lutir ella verk innganga framhaldandi í savningar savnsins, og tað er ábyrgd hjá savninum sum útdeponerar, at lutirnir verða goymdir undir tryggum umstøðum.

**Til § 12, stk. 2**
Landsstýrismaðurin kann góðkenna, at landið í serligum føri átekur sær tryggingarváða fyri at verk ella gripir kunnu verða sýnd fram í Føroyum. Mett verður um tryggingarvágan í hvørjum einstøkum føri.

**Til § 13**
Ásetingin er nýggj. Landsstýrismaðurin kann heimila einum høvuðssavni ella savnsráðnum at umsita stuðul til onnur søvn. Tjóðsavnið umsitur stuðulin til bygdasøvn sambært bygdasavnslógini og stuðulin til onnur listasøvn sambært løgtingsfíggjarlógini, meðan Mentamálaráðið umsitur stuðul til onnur søvn, sambært løgtingsfíggjarlógini. Við tíðini ber til at savna stuðulumsitingina hjá savnsráðnum við tí fyri eyga at menna dygd og virksemi hjá søvnunum, ið fáa stuðul frá landinum. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um uppgávurnar. Víst verður eisini til almennu viðmerkingarnar.

**Til § 13, stk. 2.**
Ásetingin er nýggj. Ásett verður, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um atgongd til at kæra avgerðir, sum eru tiknar sambært heimildum eftir stk. 1, harundir at avgerðir ikki skulu kunna leggjast fyri landsstýrismannin. Við ásetingini verður sipað til avgerðir, sum verða tiknar við støði í fakligum metingum í sambandi við umsiting av stuðli.

**Til § 14, stk. 1**
Ásetingin skipar, nær lógin kemur í gildi.

**Til § 14, stk. 2**
Ásetingin skipar, hvørjar lógir samstundis fara úr gildi.

Mentamálaráðið, xx. januar 2019

**Rigmor Dam**
landsstýriskvinna

/ Poul Geert Hansen
aðalstjóri

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1:
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: